gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Pan Fish økir um framleiðslu í Føroyum



Gudmund Strømsnes, stjóri í Pan Fish Norge, heldur, at framleiðslan av alilaksi í Føroyum kann økjast munandi. Í næsta ár verður Pan Fish við til at framleiða 35.000 tons í Føroyum, og tann samlaða framleiðslan er í dag 41.000 tons

**Gudmund Strømsnes, stjóri í Pan Fish Norge, heldur, at framleiðslan í føroysku alivinnuni kann trýfaldast. Pan Fish metir Føroyar sum eitt ógvuliga áhugavert øki, og fer tí at gera enn fleiri íløgur í alivinnuna her á landi**

ALIVINNA
*Stefan í Skorini*

Seinastu árini hevur ovurstóra norska fyritøkan Pan Fish gjørt stórar íløgur fyri fleiri 100 milliónir krónur í føroysk alibrúk. Samstundis hava vit upplivað, at alivinnan gongur framá í stórum fetum. Yvirskotið er økt, og framleiðslan er eisini økt mundandi.

Í samstarvi við føroyskar alarar átti Pan Fish eina knappa helvt av samlaðu framleiðsluni í fjør. Samlaða framleiðslan í Føroyum í fjør var 41.000 tons, og 20.000 av hesum átti Pan Fish ein part av.

Tað er soleiðis, at Pan Fish ger íløgur í føroyskar fyritøkur, so at føroyskir alarar standa fyri framleiðsluni, meðan leikluturin hjá Pan Fish fyri tað mesta snýr seg um at fáa pening til vega.

### Stórur vøkstur

Parturin hjá Pan Fish av føroysku framleiðsluni er vaksin munandi seinastu árini. Í 1999 vóru bara 5000 tons framleidd, har Pan Fish átti lut í framleiðsluni. Í fjør var tonsatalið 20.000 tons, og í ár verður samlaða framleiðslan hjá Pan Fish væntandi 27.000 tons.

Pan Fish hevur ætlanir um at økja sín part av føroysku framleiðsuni komandi árini, og Gudmund Strømsnes dylur ikki fyri, at Føroyar er eitt tað mest áhugaverda øki, sum Pan Fish hevur í kikaranum. Tí hevur Pan Fish ætlanir um "munandi stórar íløgur í Føroyum" framyvir.

– Tað er eingin loyna, at vit halda Føroyar vera eitt sera áhugavert øki, tá talan er um aling. Hitin í sjónum er júst tann rætti til laksin, og Føroyar hava ongar handilsforðingar, so frí atgongd er til teir stóru marknaðirnar í ES og í USA, sigur Gudmund Strømsnes.

Gudmund Strømsnes vísir eisini á, at møguleikin fyri vøkstri er góður, men ein vansi er, at møguleikarnir fyri at ala í feskum vatni ikki eru serliga góðir í Føroyum.

Pan Fish metir, at í næsta ár er fyritøkan við til at framleiða 35.000 tons í Føroyum. Hetta er næstan eins nógv og tann samlaða framleiðslan er í dag.

Stjórin í Pan Fish Norge metir, at framleiðslan í Føroyum fer at økjast munandi komandi árini, og í næsta ár metir hann leysliga, at framleiðslan fer at liggja um eini 70.000 tons.

– Vit hava sett nógvan pening í føroysku alivinnuna í farna ári, og í ár fara vit eisini at seta nógvan pening í føroyskar alifyritøkur, sigur Gudmund Strømsnes, sum tó ikki vil upplýsa, hvussu nógv talan er um.

Gudmund Strømsnes sigur í sama viðfangi, at fyritøkan sjálvsagt væntar at fáa vinning burturúr hesum íløgum, tí annars hevði hon ongantíð farið undir tílíkar ætlanir.

Gudmund sær hinvegin ongan umhvørvisligan vanda í, at framleiðslan í Føroyum verður økt so nógv.

– Tað er eingin, sum hevur áhuga í at fara illa við umhvørvinum kring aliringarnar, og allarminst alararnir. Men tað er eingin trupulleiki við at økja framleiðsluna, tí hon kundi væl verið 150.000 tons árliga. Alibrúkini skulu bara rekast á ein skilgóðan hátt, og firðirnir skulu fáa tann friðin teimum tørvar av og á, sigur Gudmund.

### Eigaraviðurskifti

Í Føroyum kunnu útlendingar ikki eiga meira enn 33% av føroyskum fyritøkum, men Gudmund Strømsnes skilur væl, at myndugleikarnir seta slíkar forðingar. Hann sigur, at Pan Fish sjálvandi helst ikki vil hava nakrar avmarkingar, men tí mugu teir bara liva við. Hann ásannar, at Føroyar eru eitt lítið land, og tørvar tí verju.

Hinvegin vísir hann á, at fleiri gera tað mistak, at samanbera alivinnuna við fiskivinnuna. Tí munurin er stórur. Alivinnan skal ala fiskin frá smolti til lidna matvøru burturúr. Meðan fiskiskip kunnu selja fiskin í teimum londum, teimum lystir.

– Vit vilja fegin vera við til, at laksurin í størri mun verður virkaður í Føroyum. Tá talan er um stórar mongdir, er grundarlag fyri at fiskurin verður virkaður í Føroyum, sigur Gudmund Strømsnes.

### ILA eingin trupulleiki

Pan Fish er partaeigari av alibrúkinum í Oyndarfirði, sum herfyri varð illa rakt av ILA-virusi. Stjórin heldur hinvegin ikki, at hetta fer at skaða umdømi hjá Pan Fish ella føroysku alivinnuna.

– Tær flestu alifyritøkurnar hava fingið ILA onkuntíð. Stóru trupulleikarnar skapa myndugleikarnir sjálvir við at gera støðuna verri, enn hon í veruleikanum er, sigur Gudmund Strømsnes og vísir á, at ongar forðingar eru fyri at selja fisk í Evropa, sum er slaktaður vegna ILA sjúkuna, tí tað er ikki ein vandamikil virus.

Gudmund Strømsnes heldur, at tiltøkini ímóti ILA í Føroyum hava verið í so víðgongd, sum ikki hava nakað samband við veruleikan. Hann heldur orsøkin vera, at tað er nýtt í Føroyum, og tí eru fólk so bangin. Sjúkan hevur verið kend í Noregi í tíggju ár, og har hava alarar lært at liva við tí.

## Tjaldrið á beding

Í komandi viku fer vaktarskipið "Tjaldrið" á beding á Tórshavnar Skipasmiðju og tá er "Brimil" einsamallur um partin av vaktarhaldinum hjá Vaktar og Bjargingartænastuni undir Føroyum.

Jóhan Simonson á Vaktar og Bjargingartænastuni sigur, at "Brimil" hevur roynst væl, síðan hann kom til landið og hann hevur røkt vaktar og bjargingartænastu saman við "Tjaldrinum". Tekniskt riggar nýggja vaktarskipið væl.

**je**

## Svartkjaftakvotan í ES sjógvi uppfiskað

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Vaktar og Bjargingartænastan sendi klokkan 11 í gjáramorgunin boð til øll svartkjaftaskipini, sum royna í ES sjógvi vestanfyri Írland, at tey skuldu hála, tí nú var kvotan upp á 62.000 tons uppfiskað. Í tveir mánaðar hava føroysku svarkjaftatrolararnir havt góðan fiskiskap vestanfyri Írland.

– Svartkjafturin er ikki enn komin í føroyskan sjógv, men tað er um reppið og russiski trolararnir eru klárir at fara til fiskiskap í føroyskum sjógvi. Teir ætla at byrja í komandi viku, sigur Jóhan Simomsen á Vaktar og Bjargingartænastuni.

Nú boðini komi til føroysku svartkjaftaskipini hevði Norðborg fingið 1800 tons. Christian í Grótinum var júst byrjaður túr, Krúnborg var á veg í íslendskan sjógv, Næraberg lá á leiðini og Jupiter og Jón Sigurdsson vóru á veg á Fuglafjørð at landa.

Í fjør kláraðu føroyingar akkurát ikki at fiska svartkvotuna upp í ES sjógvi, tá vantaðu 1500 tons. Nótaskipini eru vorðin fleiri og Næraberg er eisini komin afturat.

Í seinastu viku bóru íslendingar við svartkjaft í íslendskum sjógvi og skip leita eisini í altjóða sjógvi eftir svartkjafti.



gult13 cyan13 magenta13 svart13

# hygg & hoyr



Frá langa fríggjadegi 13. apríl til hósdagin 19. apríl

## Face/Off




*FBI-agenturin Sean Archer ger alt fyri at finna eitt oyðandi biologiskt vápn, sum er í Los Angeles. Tað arvafíggindin hjá Sean, sum eitur Troy Castor, ið hevur ætlanir um at leggja býin í oyði. Archer hevur sett alt til visk fyri at handtaka Castor, tí tað var hann, ið hevði ábyrgdina av deyða soni Archers.*

*Tað eydnast umsíðir, tá Archer fær nýtt andlit við eini skurðviðgerð. Tað er andlitið hjá Castor, og soleiðis kann hann sleppa inn í vandamikla felagsskapin hjá Troy.*

## Vælvild ella valsnild

*Annika Sølvará ummælir:*



Tað er heilt týðuligt, at næsta val ikki er langt burturi. Í vikuni skrivaðu Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið undir sáttmála, sum gevur limunum munandi størri lønarhækking, enn seinasti sáttmáli gjørdi, tá limirnir vóru í verkfalli í góðar tríggjar vikur. Løgmaður og floksfelagar hansara verða endurgivnir bæði tíðliga og seint í miðlunum. Fyrst fyri at siga, at hetta er heilt óforsvarligt og næstu løtuna ætla teir eisini at geva fólki tað, teir hava lovað í samgonguskjalinum. Tað kann undra, at tað ikki verður brúkt meira tíð at lýsa sjálva avtaluna, sum kemur at verða grundarlagið undir samráðingunum hjá hinum fakfeløgunum eftir páskir. Er søgan ikki líka stuttlig, tá allir partar eru nøgdir? Eg kundi t.d. hugsað mær at vita, hvat hini feløgini halda um avtaluna.

Økismenningarálitið sum varð handað landsstýrismanninum í mentamálum fær eisini sera positiva umrøðu. Tað er næstan ongin endi á, hvussu nógv nú skal gerast, serliga fyri neyðars Suðuroynna. Eg havi bara so ilt við at skilja, hvussu vit skulu fáa hægri løn, minni skatt og avgjøld, gera íløgur fyri 100 tals milliónir - uttanfyri miðstaðarøki skilst - samstundis sum vit skulu niðurtrappa blokkin og yvirtaka málsøkir. Hetta er ikki bara ein spurningur politiskir flokkar mugu spyrja. Tað hevði frøtt meg, um hesin spurningur var við, hvørja ferð fjølmiðlarnir viðgera fínu politisku ætlanirnar, sum næstan spríkja úr jørðini. Fíggingin skal kanska eisini koma spríkjandi onkunstaðni frá?

Tað verða søgd nógv føgur orð, um hvat skal gerast og hvat ikki má gerast longur. Tað er sum so gott, at politikarar og onnur hava greiðar meiningar um, hvussu vit skulu liva og búleikast í framtíðini. Trupulleikin er bara at alt ov ofta verða tey føgru orðini ikki til veruleika, tí neyðugu karmarnir ikki eru til staðar. Vilja vit økismenning, so er tað ikki nýggja álitið, sum kann bjarga okkum, men tær raðfestingar, sum verða gjørdar við støði í álitinum og tann játtan sum verður sett av til endamálið. Hvussu nógv álit eru ikki gjørd seinastu árini, sum stranda, tí tað ikki er samsvar millum orð og gerðir?

Eitt annað dømi hesa vikuna er, at roykipolitikkur er gjørdur fyri almennu stovnarnar. Nú er tað ikki longur loyvt at roykja á felags økjum, og bara á egnari skrivstovu, um leiðslan loyvir tí. Ístaðin skulu fólk roykja í serligum rúmum. Nógva staðni ber hetta ikki til, tí onki rúm er til tøkt. Ongin torir at siga, at fólk kunnu fara út at roykja ella leggja av, men tað verður avleiðingin nógva staðni. Her lekur eisini millum teori og praksis.

### Áhugaverd ítrottartíðindi

Ikki er tað ofta, at ítrottartíðindini hava mín stóra áhuga, men okkurt undantakið er. Avtalan hjá unga B36 spælaranum Inga Højsted við stórfelagið Arsenal má av sonnum sigast at verða stórhending í føroyska ítrottarheiminum. Onkuntíð hava vit hoyrt um landsliðið bæði tíðliga og seint, í hvørjari tíðindasending frá kl. 7 á morgni. Hendan søgan, sum nokk er nógv størri sum tíðindir, enn onkur hissini venjingardystir, kom í ÚF aftaná øll útlendsku tíðindini, beint undan sølutølunum hjá Fiskamarknaðinum. Hesuferð haldi eg, at nógv meira átti at verið gjørt burturúr, at eitt miðvíst arbeiði hjá einum unglingi og einum ítrottarfelag hevur givið so gott úrslit. Tað er veruliga nakað at verða stolt av.

### Fres

Tríggir partar av nýggju barnasendingini hjá SVF hava verið sendir. Higartil hevur sendingin verið væl móttikin her í húsinum. Hon líkist ikki Likkulikkuleia, sum hevur verið mest sædda sendingin hjá okkum í langa tíð. Dentur verður lagdur á at lata børnini sjálvi sleppa til, og tað sær út til at virka væl. Søgan um gentuna úr Gøtu, sum hevði so sterkar brillur, setti nógvar tankar í gongd hjá Katrin. Tá tey gjørdu bomm í Kvívík, sat hon við nøsini beint við skermin og mungaði. Allarbesta var tá Angela setti seg í tannlæknastólin. Dukkan Noddi er tann, sum fær láturin fram, eins og tað var Pingu í fyrru sendingunum.

### Orð um orð

Nú er tað so modernað, at alt skal verða burðardygt. Hetta gandaorðið verður knýtt at hvørjum navnorði, sum rekur framvið. Síðsta skrígg eru konufólk í burðardyggum aldri! Eg taki fult undir við viðmerkingunum hjá Sonna Smith herfyri, sum fýltist á málburðin í miðlunum. Ábyrgdin hjá loftmiðlunum at verja og lívga føroyska talumálið er ómetalig, og má takast í størsta álvara. Stór orka verður løgd í at gera sendingar við góðum innihaldi, eisini málsliga, men tað kann altíð gerast uppaftur betri.

## Fres - úr Skálavík




## Grísurin Babe




## Bestubitar: Á fjalli í Lítlu Dímun




## Við múrarnar í Kreml

